# Posta Stamps

Føroyar

No. 50

November 2021




- Postgjaldsmerki 2022: Samferðsla
- Margreta drotning II - 50 ár á trónuni
- William Morris í Føroyum 1871
- Heimsfilmur á Kalsoynni
- Norðlýsi

Posta
FAROE ISLANDS



*Vinstrumegin Svanbjørg Manai, fyrrverandi leiðari á Frímerkjadeildini, og Ingun Nolsøe Olsen, sum nú tekur yvir.*

# Nýtt frá Frímerkjadeildini

**Nýggjur leiðari á frímerkjadeildini**
Tað er mær ein gleði at boða frá, at Ingun Nolsøe Olsen er nýggjur leiðari á frímerkjadeildini.

Ingun varð sett í starv á frímerkjadeildini í januar 2016. Hon kom frá einum góðum starvi sum deildarleiðari hjá Boots í Manchester. Ingun er Bachelor í Business Economics & Tourism og hevur eina kandidatútbúgving í Business Management frá University of Manchester.

Longu frá byrjanini var tað meiningin, at hon skuldi taka við eftir meg, og má eg siga, at tað var eitt gott val. Ingun er sera vælegnað til starvið, tí hon hevur eyga fyri hvussu frímerkjaútgávurnar skulu leggjast til rættis. Harafturat hevur hon áhuga í list, mentan og søgu og tað hevur stóran týdning, um ein skal kunna lýsa allar síður av føroyska samfelagnum. Hon er ein dugnaligur leiðari og er framskygd.

Tann 1. desembur fari eg niður í hálva tíð, men haldi tó fram enn eina tíð knýtt at frímerkjadeildini - tó eisini við øðrum uppgávum.

Eg og øll starvsfólkini ynskja Ingun góða eydnu sum leiðara av frímerkjadeildini.

*Svanbjørg Manai*

# Væntandi postgjøld 1. januar 2022

**Brøv í Føroyum**

| Vekt | Brøv | Bræv-pakkar |
|---|---|---|
| 0 - 100 g | 19 kr | 43 kr |
| 101 - 250 g | 29 kr | 43 kr |
| 251 - 500 g | | 43 kr |
| 501 - 1000 g | | 61 kr |
| 1001 - 2000 g | | 69 kr |

**Brøv til útheimin**

| Vekt | Brøv | Bræv-pakkar |
|---|---|---|
| 0 - 100 g | 29 kr | 79 kr |
| 101 - 250 g | 47 kr | 79 kr |
| 251 - 500 g | | 79 kr |
| 501 - 1000 g | | 122 kr |
| 1001 - 2000 g | | 222 kr |

**Innskrivað bræv:** 50,00 kr. + postgjald.

**Úr 4 niður í 3 haldarasendingar um árið**

Frímerkjadeildin hevur gjørt av at geva færri frímerki út í 2022.

Orsøkin er fyrst og fremst tann, at tørvurin á frímerkjum til postgjald minkar ár undan ári. Alt í samfelagnum gerst dýrari – eisini brævasendingar. Við hesum í huga hava vit nú tillagað útgávuætlanina, so vit hava tríggjar haldarasendingar í staðin fyri fýra. Tvær sendingar fyrra hálvár og eina sending seinna hálvár. Ársins seinasta haldarasending er í oktobur og saman við henni er eisini jólaútgávan, t.v.s. jólamerki, árbók og ársmappa.

Tað gleðir okkum at kunngera áhugaverdu frímerkjaútgávurnar í 2022.

Ein fyribils útgávuætlan er á síðu 7 í blaðnum. Gevið gætur at broytingar kunnu verða gjørdar í ætlanini. Útgávurnar í januar verða sendar saman við februar-útgávuni seinast í februar 2022.

**Útgávan av postgjaldsmerkjum flutt til januar**

Vit hava avgjørt at flyta útgávuna av árligu postgjaldsmerkjunum frá oktobur til januar. Orsøkin er tann, at postgjaldshækkanin altíð er galdandi frá 1. januar, og tí er tað skilabest at hava útgávuna tá.

Hetta hevur við sær, at vit hava tvær útgávur av postgjaldsmerkjum innan fyri tríggjar mánaðir her í byrjanini. Báðar útgávurnar fara at verða brúktar í 2022, líka fram til nýggj postgjaldsmerki koma í januar 2023. Nýggj postgjaldsmerki fara hereftir at verða givin út í januar.







Royndarprent

# Postgjaldsmerki 2022

## Samferðsla - Ferðaflutningur í Føroyum

**Ferjutíðin**

Eftir at kongligi einahandilin varð avtikin í 1856 – og skiftið frá miðaldarligum bóndasamfelag til nútímans fiskivinnutjóð var byrjað, vaks tørvurin á betri flutningsmøguleikum í Føroyum. Tørvur var á einum farma- og ferðafólkaskipi at sigla millum oyggjarnar.

Eftir at løgtingið hevði havt málið um keyp av einum almennum strandfaraskipi liggjandi í yvir tíggju ár, misti leiðslan í størstu fyritøkuni í landinum, *A/S J. Mortensens Eftf.* tolið. Teir lótu eitt dampskip byggja á svenskari skipasmiðju og fingu nýbygningin í desembur 1895. Skipið varð doypt "Smiril" – og varð í januar 1896 sett í fasta rutusigling millum Tvøroyri og Havnina, bygdirnar í Suðuroy og stóru bygdirnar í landinum. So brátt *A/S J. Mortensens Eftf.* hevði prógvað, at strandfarasigling lønti seg í Føroyum, komu aðrar fyritøkur og einstaklingar teimum á baki, millum aðrar, *A/S Thorshavns Mælkeforsyning* við lítla guvuskipinum Ruth í 1904 - og seinni fleiri mjólkarbátum. Brátt fluttu fleiri smærri før ferðafólk, farm, mjólk og post millum bygd og bý.

**Strandfaraskip Landsins**

Í 1917 yvirtók Færøernes Amtskommune raksturin av Smirli og stovnaði almenna reiðaríið Strandfaraskip Landsins, millum manna rópt Strandferðslan. Fyrstu mongu árini tókst Strandferðslan bara við raksturin av Smirli, men seinni yvirtók Strandferðslan tær rutur ið ikki bóru seg, meðan privata vinnulívið helt fram á rutunum, ið kastaðu vinning av sær.

Í seksti – og sjeytiárunum yvirtók Strandferðslan allar strandfararutur í landinum. Gomlu skipini og ferjurnar vórðu so líðandi skift út við nýggjari før – og nýggjasta farið er lítla tríkiljan Erla Kongsdóttir, sum er myndevni á eina postgjaldsmerkinum. Erla Kongsdóttir er avloysaraskip, ið skal setast inn, um eitt av smáskipunum skal umvælast ella til eftirlit.

**Tunlatíðin**

Fyrsti bilurin kom til Føroya fyrst í tveytiárunum – og slapp ikki langt út um bøgarðarnar í Havn. So at siga ongir egnaðir landsvegir vóru til yvirhøvur. Men brátt komu fleiri honum á baki, serliga smáir lastbilar og bussar – og skundisliga løgd veganet stungu seg upp runt um í landinum.




*Ein av bláu bussunum hjá Bygdaleiðum á Trøllanesi. Mynd: Ólavur Frederiksen*

Vinnuligar bussrutur byrjaðu at koyra frá plássunum har strandfaraskipini løgdu upp – og fluttu ferðafólk og léttan farm víðari til grannabygdirnar.

Í fimti- og sekstiárunum vórðu flestu av hesum lokalu vegunum tengdir saman – og fyrst í sjeytiárunum byrjaði ein meira systematisk yvirháling av samlaða vegakervinum – og munandi ábøtur vórðu framdar.

Heilt stóra frambrotið kom í 1973, tá brúgvin um Streymin varð tikin í nýtslu og trý ár seinni, tá Norðskálatunnilin lat upp. Nú var teinurin úr Havn inn á Skálafjørðin, eystaru bygdirnar í Eysturoy – og til Norðoyggjar, munandi styttur.

Í 1985 kom Leirvíkstunnilin, ið gjørdi leiðina til ferjuleguna til Klaksvíkar munandi høgligari, og í 1992 kom tunnilin millum Kaldbaksbotn og Kollafjørð, sum førdi við sær, at tað ikki longur var neyðugt at koyra eftir oyggjarvegnum til og úr Havnini.

Næsta stóra logistiska framtakið var tá undirsjóvartunlarnir komu. Fyrst Vágatunnilin í 2002, sum bant Streymoynna og Vágarnar saman – síðan Klaksvíkstunnilin í 2006, sum bant Norðoyggjar við meginøkið. Tað kann kanska tykjast eitt sindur ógvusligt við slíkum ovurstórum íleggingum, men havast skal í huga, at tunlarnir avloystu fýra kostnaðarmiklar ferjurutur.

Í 2020 var so triði og longsti undirsjóvartunnilin liðugur, sum bindur Skálafjørðin við høvuðstaðarøkið. Endamálið við hesum tunlinum er at stytta um leiðina millum Havnina, Skálafjørðin og Norðoyggjar. Í skrivandi stund eru tunnilsmenn í holt við at bora fjórða undirsjóvartunnilin millum Suðurstreym og Sandoynna. Tá hendan verkætlan er liðug, verður væntandi hol sprongt fyri fimta og endaliga undirsjóvartunnlinum millum Sandoy og Suðuroy. Tá hesin einaferð stendur liðugur, verður gjørligt at koyra frá sunnastu bygd í Føroyum,



*Erla Kongsdóttir. Mynd: Regin Torkilsson.*

Sumba – til norðastu, Viðareiði – væl at merkja uttan at sigla yvirhøvur.

**Nýferðslan**

Megnartøkini á vegakervinum og við tunlunum øllum, merkir at víðgongdar umleggingar verða framdar á logistiska økinum í Føroyum nú og komandi tíðina. Burtursæð frá leiðunum til nakrar av minstu útoyggjum okkara, verða skip og ferjur ikki longur neyðugar fyri samferðsluna. Í staðin verða tað bilar, bussar og lastbilar, sum koma at flyta fólk og farm millum oyggjarnar.

**Bygdaleiðir**

Í 1980 varð almenna bussfyritøkan, *Bygdaleiðir*, stovnað og almennar bussleiðir skipaðar fyri alt landið. Bygdaleiðir var í nítiárunum lagt undir Strandferðsluna. Almenna bussleiðin gjørdi tað munandi lættari at ferðast yvir land, serliga á longu leiðunum millum Havnina og flogvøllin í Vágum, ella millum Klaksvík og Havnina. Á postgjaldsmerkjunum eru Bygdaleiðir umboðaðar við bláa bussinum.

Reyði bussurin, harafturímóti, er ein av býbussunum í Havn. Býbussarnir verða riknir av kommunala felagnum, *Bussleiðin*, sum varð stovnað í 1979. Í sjeytiárunum var høvuðstaðurin farin at veksa so mikið, at tørvur var á almennum bussum í býnum. Og tað var eitt framskygt tiltak. Síðan fyrsti reyði bussurin legði út á havnargøtur, er býurin vaksin til meir enn tað dupulta í vavið.

Í 1980, víðkaði Strandferðslan um virksemið við einari tyrlurutu. Nú bar til at ferðast munandi skjótari millum meginøkini í landinum. Men høvuðsendamálið við tyrluflúgvingini var tó at tryggja smáu útjaðaraoyggjunum tryggari og meira álítandi samband við meginøkini.

Tyrlutænastan varð í 1980 yvirtikin av Atlantsflogi, sum nú flýgur í fastari rutu oyggjanna millum og tekur sær av bráðfeingis sjúkraflutningi, um tað er neyðugt.

*Anker Eli Petersen*

# Fyribils útgávuætlan 2022

| | |
|---|---|
| **3. januar** | **Postgjaldsmerki 2022: Samferðsla.** 4 tekningar. Listafólk: Janus Guttesen. |
| **14. januar** | **Margreta drotning II - á trónuni í hálva øld.** Smáark við 1 frímerki. Svartprent og mappa við smáarki, svartprenti og fdc. Listafólk/gravør: Martin Mörck. |
| **28. februar** | **William Morris í Føroyum í 1871.** Smáark við 1 frímerki. Lagt til rættis/layout: Kim Simonsen. |
| | **Heimsfilmur á Kalsoynni**. 2 frímerki, sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum og 2 postkort. Myndir: Jákup Brúsá. |
| | **Norðlýsi.** 2 frímerki. Myndir: Thomas Vikre og Árni Øregaard. |
| | **Fyrsta føroyska bókin 200 ár.** Smáark við 2 frímerkjum. Listafólk: Ole Wich. |
| **16. mai** | **Europa 2022: Søgur & sagnir.** 2 frímerki og sjálvklistrandi hefti. Listafólk: Anker Eli Petersen. |
| | **Lívrunnin list.** 6 frímerki. Listakvinnur: Astrid Andreasen, Jórunn D. Poulsen og Tita Vinther. |
| | **Sepac 2022: Føroyskar drykkjuvørur.** 1 frímerki. Anker Eli Petersen. |
| **24. oktober** | **SALT - Sound Art  Live Theatre.** Smáark við 2 frímerkjum. Myndir: Fotostudio. |
| | **Jól og advent**. 2 frímerki, sjálvklistrandi hefti og 2 postkort. Listafólk: Heiðrik á Heygum. |
| | **Jólamerki, árbók og ársmappa.** |

*NB! Fyrivarni skal takast fyri broytingum í útgávuætlanini.*




Royndarprent




# Margreta drotning II - á trónuni í hálva øld

Árið 2022 verður eitt av teimum heilt stóru hátíðarárunum hjá danska kongshúsinum. 14. januar 2022 fer Margreta drotning II at kunna hátíðarhalda, at ein hálv øld er liðin, síðani hon gjørdist drotning. Nógvar fyrireikingar vóru gjørdar at gera nógv burturúr, tá Margreta drotning II 16. apríl 2020 fylti áttati ár, men øll tiltøk í sambandi við tað hátíðarhaldið vórðu avlýst, tá ið korona rakti heimin sum eitt óløgi. Tí er einki at siga til, at bæði hugurin og tørvurin á at gera nógv burtur úr hátíðarárinum 2022 er stórur.

Posta gevur í sambandi við hátíðardagin út eitt smáark, har Margreta drotning II situr framman fyri Kirkjubømúrin. Drotningin er í sínum føroysku klæðum, og kring hana er grønur bøur og blátt hav. Á tann hátt vísir hetta smáarkið tokka hennara til Føroyar, og føroyska søgu, mentan og náttúru.

Drotningin las fornaldarfrøði í Onglandi í 1960-61, og fornfrøðiligar kanningar hava víst, at múrurin í Kirkjubø helst varð gjørdur liðugur um ta tíðina, tá ið Margreta I var drotning í Danmark. Tað var stutt eftir, at Føroyar saman við Noregi gjørdust partur av tí dansk-norska ríkinum í 1380. Komandi ár kunnu vit siga, at Føroyar hava verið partur av ríkið danska drotsins í 642 ár, og í 50 av teimum árunum hevur Margreta drotning II verið drotning.

Einasti kongur, sum hevur sitið longri á trúnuni enn Margreta drotning II, er Kristian IV. Hann gjørdist longu sum smádrongur kongur, og tí eydnaðist tað honum at sita sum kongur í seksti ár, frá 1588 til 1648. Um tað fer at unnast Margretu drotning II at hátíðarhalda seksti ára dag sín sum drotning í 2032, fer hon samstundis at kunna taka metið sum tann, sum hevur sitið longst á trúnuni í einum av heimsins elstu kongaríkum.

Eitt met eigur Margreta drotning II kortini longu bæði væl og virðiliga. Eingin av kongunum undan henni hevur vitjað í Føroyum



*Margreta drotning II á vitjan í Føroyum í juli 2021. Mynd: Ólavur Frederiksen.*

so ofta sum hon síðani fyrstu kongavitjanina í 1874. Til minnis um hesa fyrstu kongavitjanina varð ein minnisvarði, eitt kongaminni, reist á einum ásýniligum heyggi í Havn.

Eingin minnisvarði er reistur yvir Margretu drotning II í Føroyum, og tørvur er heldur ikki á nøkrum sjónligum minnisvarða. Tað kom greitt til sjóndar, tá ið Margreta drotning II vitjaði oyggjarnar í 2021. Í onkrum av bygdunum, hon vitjaði, varð skipað so fyri, at hon kom at standa á júst sama staði, sum hon gjørdi, tá ið hon vitjaði saman við foreldrum sínum sum krúnprinsessa fyri millum 60 og 70 árum síðani. Fyri mong eldri fólk var tað ein heilt serstøk uppliving á henda hátt at endurupplivа eitt minni, sum tey høvdu havt kært í so mong ár.

Hesar søgurnar vísa betur enn so nógv annað, at drotningin ikki hevur brúk fyri, at nakar reisir henni eitt minni. Tað hevur hon sjálv gjørt, tí við mongu føroyavitjanum sínum hevur Margreta drotning II reist eitt drotningaminni í minninum hjá flest øllum føroyingum. Í hesum arbeiði sínum var maður hennara Heindrikur prinsur, sáli, ein sera góður stuðul, tí eingin kundi ivast í, hvussu fegin hann var, tá ið hann vitjaði í Føroyum saman við drotningini.

Stóri áhugin, sum Margreta drotning II hevur víst Føroyum og føroyskari mentan, hevur havt stóran týdning fyri góða umdømi hennara í Føroyum. Sjálvt um øll ikki eru samd um, hvønn týdning kongshúsið eigur at hava í dag, so ber illa til at gera annað enn hava virðing fyri einari drotning, sum hevur lært seg føroyskt mál og føroyskan dans. Harumframt ber hon føroysku klæði síni við stoltleika, og hon hevur dygt innlit í føroyska list og man hava vitjað so at siga hvønn krók í landinum. Sjálvt um vitjanirnar hava verið mangar, so er Margreta drotning II líka vælkomin á føroyavitjan í dag, sum hon var fyri 50 árum síðani.

*Erling Isholm, Søgufrøðingur*




Royndarprent




# William Morris í Føroyum 1871

## og horvni vevnaðurin: *Pure Torshavn Weave Fabric*

William Morris (1834 –1896) var ein enskur listamaður, listhandverkari og sosialistur. Hann kom at broyta sína samtíð, bæði við sínum tonkum, sniðgeving og bókmentum. William Morris las guðfrøði á Oxford Universiteti, og las seinni til arkitekt.

Longu sum ungur fór Morris at finnast at kapitalismuni, ið hann helt skapti ljót ting t.d. búnýti, ið eingin hevði brúk fyri. Kapitalisman dálkaði heimin, meðan enski arbeiðarin livdi undir trælakorum.

William Morris er kendur fyri at siga, at einki skal vera í einum húsi, ið ikki er brúkiligt ella vakurt. Her peikar hann fram móti 20indu øld og rørslum sum funktionalismuni og týska Bauhaus skúlanum.

Morris var tó eingin modernistur. Sum ungur var hann áhugaður í skaldskapinum hjá skotska høvundanum Walther Scott, ið fekk hann at skilja miðaldarliga mentan, søguliga romansu og serlig landsløg.

Morris fekk nógvan íblástur frá sínum vinum, serliga prerafaelitisku listamonnunum Dante Gabriel Rossetti og Edward Burne-Jones. Seinni gjørdist Morris mest umráðandi umboðið fyri ensku Arts and Crafts rørsluna, ið vendi ídnaðarkollveltingini ryggin.

**Tey vøkru tingini**

William Morris vildi ikki vera prestur, men listamaður og fór at skapa vøkur ting, so sum tapet, vevnað, møblar og litaði glasvindeygu. Hann var eisini av kendastu høvundunum og yrkjarunum í Onglandi.

Í 1871 og í 1873 vitjaði Morris í Íslandi. Tað var soleiðis hann eisini kom til Føroya, har hann vitjaði tvær ferðir.

**Ferðin til Føroya í 1871**

Morris var bergtikin av Føroyum beinanvegin. Føroyar vóru fyrsta norðurlenska landið hann hevði vitjað.

Við á ferðini var eisini dreymur Morris um at finna eitt land, har fólkið og náttúran ikki

vóru oyðiløgd av kapitalismuni. Eitt samfelag, ið bygdi á vinskap og felagsskap, heldur enn ein kapitalistiskan logik um at menniskju bert liva á einum marknaði.

Hann skrivaði seinni, at heimurin var við at vera oyðilagdur av dálking og kolonialismu, og at hann nú vildi finna eitt samfelag, ið bygdi á vinskap millum manna.

Hann sá við gløggum eygum, hvussu føroysk klæðir og hús vóru gjørd. Í Kirkjubø dámdi honum kirkjubøstólarnar, serliga hvussu væl teir vóru útskornir.

Metingarnar hjá honum av Havnini vóru jaligar, og hann sá alt við mildum eygum, ið ikki var so vanligt tá millum ensk og fremmand ferðandi.

Hann var kensluborin og mangan rørdur, m.a. av at síggja kendar blómur á einum staði, sum fyri hann var so fjarskotið:
*"...ein serligur og poetiskur staður, soleiðis sær hetta landið út fyri mær, meiri fjarskotið og melankolskt enn eg kann siga frá, sjálvt um her vaksa blómur, græs og sólin skínur."*

Morris helt fyri um føroysku húsini:
*"...húsini eru øll av træi, við høgum tekjum og hvítum vindeygum, meðan veggir eru smurdir við Stockholm tjøru, flagtak er á húsunum har grøs og blómur vaksa ...vit møttu fólkum, sum vóru fólkalig, og tey virka sum um tey hava eitt gott lyndi og eru nøgd. Kvinnurnar eru ikki penar, men heldur ikki ræðuliga ljótar; menninir eru vakrir og hábærsligir í teirra vøkru klæðum."*

Tá M.S. Diana legði leiðina út gjøgnum Vestmannasund runnu vestmenningar teimum á møti fyri at síggja skipið og fólkini.

Nakrar dagar aftaná skrivaði William Morris um at siga farvæl við Føroyar:




*Kortið vísir ferð Morris úr Skotlandi til Føroya og til Íslands.*

*"Aldrin havi eg sæð nakað, sum var so nógv sum tikið úr einum dreymi, so undurfult vakurt sum tað var at koma út gjøgnum Vestmannasund og stevna beinleiðis út á Atlantshavið, aftanfyri okkum veggir av gróti og hesi høgu fjøllini, og frammanfyri okkum ein skuggaleys skýmingarløta. Einki eg havi sæð, hevur vakt so nógva virðing og undran sum hendan sjónin."*

**Gloymdi vevnaðurin:**
***Pure Tórshavn Weave Fabric***
Morris gav okkum meira enn sína vælskrivaðu ferðafrásøgn; hann sniðgav ein serligan vevnað, eitt tekstil, ið hann kallaði *Pure Tórshavn Weave Fabric*. Tá vit lesa dagbók hansara frá ferðini, eru tað serliga gráir litir hann festi seg við - grasið er grátt, havið er grátt og bøurin er gráur í mjørkanum, tí er tað ikki so løgið, at hesin vevnaðurin finst í tveimum litbrigdum av gráum, ið passa væl við tað litraðið, sum vit kenna í Føroyum. Hesir gráu litir eru í andstøðu til blómurnar og litirnar vit annars finna í Arts og Crafts rørsluni. Styrkin við hesum vevnaðinum er at hann er klassiskur og modernaður, meira enn 150 ár aftan á at William Morris sniðgav hann í Føroyum í 1871.

*Kim Simonsen Ph.D. MA.*








Royndarprent

# Heimsfilmur á Kalsoynni

**James Bond í Føroyum**

Seint á sumri sært tú serliga í Norðuroyggjum fjøll, ið tykjast stoyta seg í havið, rætt sum Kópakonan. Hesa ársins tíð kunnu fjøllini verða so djúpt grøn, at yvir havinum tykjast tey bleiktrandi blágrøn og ganga sum ein hvørvisjón inn í eina dramatiska heild við egnum darrandi liti.

Tí er tað lívsjáttandi, at nýggi James Bond filmurin *"No Time To Die"* er upptikin á júst hesum leiðum.

Hóast Føroyar vóru millum fyrstu í Norðuratlantshavi at fáa sær góðan biograf, eru sjáldsama fáir filmar gjørdir her um leiðir. Kongavitjanir hava verið filmaðar longu í 1907, tá Nordisk Film, sum er heimsins elsta filmsframleiðslufelag, var her á vitjan.

Men tá kongur vitjaði í 1926 hava føroyingar sjálvir átt upptøkutól og hava filmað hendingina í Havn og á Tvøroyri.

Umframt hátíðarvitjanir við kongi og kendum fólki, hava fleiri føroyingar eisini filmað gerandisdagin, tí langfaramenn hava keypt filmstól, bæði til at vísa heimafólkum stóra útheimin og at taka upp tað nýggjasta har heima, so minnini kundu goymast og takast fram á fiskifeltinum.

Hesin søguligi veruleiki hevur lagt lunnar undir ein fólkalívsfrøðiligan áhuga at eygleiða stórt og smátt á filmi heima og úti.

Nýggjasta er, at vit eru sloppin upp í part at siga altjóða søgur um avrikskappar og ljótastu bartrog. Ikki tí, kvæði, sagnir og ævintýr hava sagt okkum hesar somu søgur í túsund ár ella so.

Sum frásøgn millum øldir er einki nýtt, annað ein útbreiðslan.

Vit, sum hava livað so avbyrgt við endan á Golfstreyminum, hava nú fingið allan heimin á gátt, tí tey vilja sleppa at brúka okkara náttúrugivnu gluggatjøld til teirra tíðarbæru søgur, har gott møtir illum, og hetjan letur okkum vita, at verðin er í góðum hondum.




*Kalsoy. Mynd: Jákup Brúsá.*

Hóast mannaskaptu avbjóðingarnar kunnu tykjast daprar er altíð ein vón, sum verður forloyst í hetjuni og hansara hondum. Og hvør veit, kanska verður fremsta hetjan ein skjønnan dag ein kvinna, sum Wonder-woman, ið fer at bjarga heiminum undan oyðileggjandi kreftum, ið vilja leggja materialistiska heimin undir seg, so sum hvítar mannfólkahetjur hava havt lyndi til á filmi.

Tí er tað ein serlig gleði, at Føroyar hava kallað fremstu biografhetjuna higar at gera 25. filmin, "No Time To Die". Hóast løtan er avmáld og neyvan kennist aftur hjá okkum fáu, ið búgva her, er hon týðandi sum fasinatiónsobjekt hjá biografgangaranum úti í heimi, tí eyðkenda atdráttarmegin hjá fjøllum og havi er altíð sterk. Hóast fjart í veruleika, eru vit so nær á filmi. Tí tað er har, vit lata upp fyri ævintýrum.

Tí er umráðandi at vit umsita henda gudagivna gimstein væl og foredla hann, so vit ikki eru ein innantóm kulissa, ið verður rend um koll av ferðafólki.

Fyrra avbjóðingin er at fáa natúrliga partin av vinnuligu filmsframleiðsluni, so vit kunnu førleikamenna okkum sum filmstjóð í Norðuratlantshavi. Seinna avbjóðingin er ikki minni, við tað at filmur sum fremsti tølandi miðil kann fáa fólk av húsi at vitja okkara dýrabærastu støð, har bert fá sleppa til í senn. Hond í hond við lokalum aktørum, bóndum og ferðavinnuni er tað ongantíð av størri týdningi enn beint nú at skapa varandi bond og eina felags fatan av ferðavinnu-upplivingum, sum annað og meir enn bara at deila ein skattatekniskan køkubita á tekniborðinum. Slitsterkastu søgur heimsins hava aldri verið nærri okkara túni. Framman fyri altjóða biografløriftinum mugu vit sanna, at júst har er tað okkara største avbjóðing í dag.

*Birgir Kruse*










# Norðlýsi

Seint á sumri sært tú serliga í Norðuroyggjum fjøll, ið tykjast stoyta seg í havið, rætt sum Kópakonan. Hesa ársins tíð kunnu fjøllini verða so djúpt grøn, at yvir havinum tykjast tey bleiktrandi blágrøn og ganga sum ein hvørvisjón inn í eina dramatiska heild við egnum darrandi liti.

Tí er tað lívsjáttandi, at nýggi James Bond filmurin *"No Time To Die"* er upptikin á júst hesum leiðum.

Hóast Føroyar vóru millum fyrstu í Norðuratlantshavi at fáa sær góðan biograf, eru sjáldsama fáir filmar gjørdir her um leiðir. Kongavitjanir hava verið filmaðar longu í 1907, tá Nordisk Film, sum er heimsins elsta filmsframleiðslufelag, var her á vitjan.

Men tá kongur vitjaði í 1926 hava føroyingar sjálvir átt upptøkutól og hava filmað hendingina í Havn og á Tvøroyri.

Umframt hátíðarvitjanir við kongi og kendum fólki, hava fleiri føroyingar eisini filmað gerandisdagin, tí langfaramenn hava keypt filmstól, bæði til at vísa heimafólkum stóra útheimin og at taka upp tað nýggjasta har heima, so minnini kundu goymast og takast fram á fiskifeltinum.

Hesin søguligi veruleiki hevur lagt lunnar undir ein fólkalívsfrøðiligan áhuga at eygleiða stórt og smátt á filmi heima og úti.

Nýggjasta er, at vit eru sloppin upp í part at siga altjóða søgur um avrikskappar og ljótastu bartrog. Ikki tí, kvæði, sagnir og ævintýr hava sagt okkum hesar somu søgur í túsund ár ella so.

Sum frásøgn millum øldir er einki nýtt, annað ein útbreiðslan.

Vit, sum hava livað so avbyrgt við endan á Golfstreyminum, hava nú fingið allan heimin á gátt, tí tey vilja sleppa at brúka okkara náttúrugivnu gluggatjøld til teirra tíðarbæru søgur, har gott møtir illum, og hetjan letur okkum vita, at verðin er í góðum hondum.

Hóast mannaskaptu avbjóðingarnar kunnu tykjast daprar er altíð ein vón, sum verður forloyst í hetjuni og hansara hondum. Og hvør veit, kanska verður fremsta hetjan ein skjønnan dag ein kvinna, sum Wonder-woman, ið fer at bjarga heiminum undan oyðileggjandi kreftum, ið vilja leggja materialistiska heimin undir seg, so sum hvítar mannfólkahetjur hava havt lyndi til á filmi.

Tí er tað ein serlig gleði, at Føroyar hava kallað fremstu biografhetjuna higar at gera 25. filmin, "No Time To Die". Hóast løtan er avmáld og neyvan kennist aftur hjá okkum fáu, ið búgva her, er hon týðandi sum fasinatiónsobjekt hjá biografgangaranum úti í heimi, tí eyðkenda atdráttarmegin hjá fjøllum og havi er altíð sterk. Hóast fjart í veruleika, eru vit so nær á filmi. Tí tað er har, vit lata upp fyri ævintýrum.

Tí er umráðandi at vit umsita henda gudagivna gimstein væl og foredla hann, so vit ikki eru ein innantóm kulissa, ið verður rend um koll av ferðafólki.

Fyrra avbjóðingin er at fáa natúrliga partin av vinnuligu filmsframleiðsluni, so vit kunnu førleikamenna okkum sum filmstjóð í Norðuratlantshavi. Seinna avbjóðingin er ikki minni, við tað at filmur sum fremsti tølandi miðil kann fáa fólk av húsi at vitja okkara dýrabærastu støð, har bert fá sleppa til í senn. Hond í hond við lokalum aktørum, bóndum og ferðavinnuni er tað ongantíð av størri týdningi enn beint nú at skapa varandi bond og eina felags fatan av ferðavinnu-upplivingum, sum annað og meir enn bara at deila ein skattatekniskan køkubita á tekniborðinum. Slitsterkastu søgur heimsins hava aldri verið nærri okkara túni. Framman fyri altjóða biografløriftinum mugu vit sanna, at júst har er tað okkara størsta avbjóðing í dag.

*Birgir Kruse*

# Nýggjar útgávur 3. og 14. januar og 28. februar 2022




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2022: Samferðsla** |
| Útgávudagur: | 03.01.2022 |
| Virði: | 4 x 19,00 kr |
| Stødd: | 55,0 x 22,5 mm |
| Listafólk: | Janus Guttesen |
| Prentingarháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Limo Labels, Danmark |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Á trónuni í hálva øld** |
| Útgávudagur: | 14.01.2022 |
| Virði: | 50,00 kr |
| Nummar: | FO 971 |
| Stødd, frímerki: | 31 x 52 mm |
| Stødd, smáark: | 100 x 70 mm |
| Snið / gravura: | Martin Mörck |
| Prentingarháttur: | Stálprent/Offset |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innskrivað sending |
| Aðrar vørur: | Souvenirmappa og svartprent |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **William Morris í Føroyum 1871** |
| Útgávudagur: | 28.02.2022 |
| Virði: | 61,00 kr. |
| Nummar: | FO 972 |
| Stødd, frímerki: | 65 x 44 mm |
| Stødd, smáark: | 93 x 70 mm |
| Lagt til rættis: | Kim Simonsen |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Bpost, Belgia |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja brævpakkar, 501-1000 gr. |







Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Heimsfilmur á Kalsoynni** |
| Útgávudagur: | 28.02.2022 |
| Virði: | 19,00 og 29,00 kr. |
| Nummar: | FO 973 - 974 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Myndir: | Jákup Brúsá |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja brøv og brøv til útheimin, 0-100 gr. |
| Aðrar vørur: | Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Norðlýsi** |
| Útgávudagur: | 28.02.2022 |
| Virði: | 19,00 og 43,00 kr. |
| Nummar: | FO 975-976 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 30 mm |
| Myndir: | Thomas Vikre og Árni Øregaard |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja brøv og brævpakkar, 0-100 gr. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: James Bond bussur í Havn. Myndatøka: Ólavur Frederiksen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps